

**Fakta**

Margareth og Andrew Djurhuus búgva í Syðrugøtu
Tey eru bæði 32 ára gomul
Tey eiga børnini Bjørg (8) og Benjamin (6).
Andrew starvast sum flogmekanikari hjá Atlantsflogi
Margareth er ráðgevi í Eik

# ini til deyðan



*Andrew og Margareth Djurhuus saman við børnunum í Syðrugøtu, har tey búgva. Mynd: Høgni Thomsen*

lækna beinanvegin. Vit koyrdu til læknan í Fuglafirði, men eg kendi meg betur, tá ið eg kom til læknan. Eftir eina løtu kom hann til ta niðurstøðu, at eg skuldi sendast á Landssjúkrahúsið til kanningar.

- Ambulansi kom eftir mær, og portørarnir hildu meg verða so illa fyri, at teir koyrdu við útrykningi til Havnar. Eg hevði tað so mikið gott í ambulansanum, at eg hevði næstan hug at biðja teir koyra meg heimaftur. Føldi meg eitt sindur illa við at fara til Havnar at seta alt systemið í gongd av ongum.

## Helt seg verða til fortreð

Á Landssjúkrahúsinum var Andrew lagdur inn á intensivu deild til observatión. Tað var trongligt á deildini, og hann lá í eini song á gongini.

- Eg føldi meg eitt sindur býttan, tí eg helt, at eg var bara til fortreð. Ein sjúkrasystur, sum vit kendu, segði við meg, at eg skuldi ikki káva út yvir nakað. Eg skuldi siga læknanum akkurát, hvussu eg hevði tað, sigur Andrew.

Margareth var við manninum á Landssjúkrahúsinum, og hon hjálpti Andrew við at fáa okkurt at eta.

- Sjúkrasysturin segði aftaná, at hon sá, at eg skar breyðið til Andrew, og tí helt hon, at alt var ikki í lagi. Tí bað hon Andrew lata verða við at lata ov væl at. Kanska fortrongdu vit tankan um, at tað skuldi verða nakað alvorligt galið, sigur Margareth.

Læknin sendi Andrew í CD-skannaran, og tá ið hann kom útaftur, var sum vent í holuni.

- Eg merkti beinanvegin, at tey høvdu sæð okkurt í skannaranum. Nú var pláss fyri mær inni á einari stovu, onkur annar varð koyrdur út á gongina, og fleiri sjúkrasystrar og læknar rokaðust rundan um meg. Tá hevði klokkan hevði sligið, greiðir Andrew frá.

- Læknin kom so inn og segði, at høvuðspulsæðrin til hjartað var skrædnað. Tað kundu teir einki gera við í Føroyum, og tí skuldi eg sendast til Danmarkar við flogfari beinanvegin. Í mínum arbeiði sum flogmekanikari havi eg fleiri ferðir verið við til at sent fólk niður á sjúkrahús, og tá veit mann, at tað stendur einki til, og at summi koma ikki heimaftur á lívi.

## Sendi sms til vinir og familju

Tíðliga mánanáttina var Andrew koyrdur á flogvøllin, har flogfarið hjá Atlantsflogi – hansara egna arbeiðspláss – skuldi flúgva hann niður.

- Tað var ein løgin kensla at koma á flogvøllin. Eg havi sjálvur fleiri ferðir gjørt børuna klára umborð á flogfarinum, og eg havi onkuntíð hugsað, at fyrr ella seinni kemur onkur í hasa børuna, sum eg eg kenni. Eg hevði tó ikki hugsað, at eg skuldi enda í henni, sigur Andrew.

- Kollegarnir hjá mær stóðu har, og tá upplivdu teir helst tað, sum eg hevði hugsað. Magni Arge kom eisini forbí, og tað var eg glaður fyri.

Margareth fór við Andrew til Danmarkar, og á flogvøllinum upplivdu hon, at maðurin vildi geva boð frá sær.

- Andrew var sera bevístur um, hvat hann vildi. Magni og kollegarnir fingu at vita, hvat